# Synd í teimum, sum skulu byggja hús í Føroyum

**Føroyskir handverkarar streyma av landinum og byggivinnan rópar neyðarróp. Tey, sum hava brúk fyri handverkarum skulu fyrireika seg uppá, at tað verður bæði nógv dýrari og nógv longri at bíða**

BYGGIVINNAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Tað verður bæði dýrari og longri at byggja hús í Føroyum, siga byggimeistarar við Sosialin. Serliga stórur tørvur er kanska á elektrikarum í løtuni, tí teir streyma í stórum tali til Noregs at arbeiða, har brúk er fyri øllum kreftum í oljuvinnuni*

Tað fer at verða óluksáliga synd í teimum, sum skulu byggja hús. Í framtíðini fer tað at vera nógv dýrari at byggja hús í Føroyum. Samstundis fer tað at vera nógv longri at bíða eftir handverkarum.

Tað ivast føroyskir byggimeistarar ikki í.

Teir merkja av álvara, at føroyskir handverkarar, og serliga elektrikarar í hesum døgum streyma til Noregs at arbeiða, har teir fáa sera góðar sømdir.

Serliga hava elinnleggjarar seinastu tíðina mist nakrar elektrikarar til Noregs.

Tað sær út til at marknaðurin í Noregs mettast ikki og tað tað sær út til, at føryoska byggivinnan verður mestsum drenað fyri elektrikarar.

Byggimeistarar vita, at yvir 30 elektrikarar hava verið í Noregi í eina tíð og teir hava frætt, at yvir 30 skulu yvir afturat.

– Teir, sum útvega elektrikarar til norska arbeiðsmarknaðinum, ringja til frá elektrikara til elektrikara í Føroyum og bjóða teimum arbeiði. Og tá ið so stórt tal fer av landinum, er eyðsæð, at tað verða ikki nógvir eftir í Føroyum.

Sjálvur undrast hann ikki á, at elektrikarar taka av tilboðnum at fara yvir til Noregs, tí umstøðurnar eru sera góðar. Teir arbeiða í tveir vikur og hava frí í tríggjar vikur, og hava yvir 20.000 krónur eftir í lummanum.

Elinnleggjarar, sum ikki leggja í at leggja navn til, siga, at hendan gongdin fer at fáa avleiðingar fyri byggivinnuni í Føroyum.

– Tað fer í fyrstu atløgu at gera, at bíðitíðin eftir at fáa elektrikarar, fer at vera munandi longri, enn hon hevur verið. Men tá ið tað er so ringt at fáa elektrikarar, er tað eisini skilligt, at prísurin fer upp.

Sjálvir meta teir, at tað er blivið eini 10% dýrari at fáa elektrikara hesar seinastu mánaðirnar.

Og tað er baa ein, sum kann fáa rokningina, og tað er viðskiftafólkini.

– Tað verður óluksáliga synd í okkara viðskiftafólkum framyvir, siga teir.

Taka vit eitt dømi um ein, sum skal byggja eini hús, so er tað ein samanhangandi tilgongd, har timburmenn, elektrikarar, rørleggjarar, málarar o.s.fr. skulu arbeiða í hølunum á hvørjum øðrum. Og verður tað leingi at bíða eftir elektrikaranum, fer tað eisini at seinka øðrum handverkarum, eitt nú timburmonnum og málarum.

So alt í alt fer trotið á elektrikarum at gera, at tað fer at verða munandi longri at fáa eini hús bygt, ella at fáa eitt arbeiði gjørt vvirhøvur.

Onkur hevur nevnt, at so er bara at fáa útlendingar hendavegin at arbeiða.

Men tá ið tað ræðir um elektrikarar er hetta ikki so einfalt, tí tað er bara tann danska útbúgvingin, sum er góðkend í Føroyum. Sostatt ber bara til at fara til Danmarkar eftir elektrikarum,men har er eisini rættiliga nógv arbeiði.

– Eg síggi fyri mær, at føroyska byggivinnan stendur fyri stórum trupulleikum og eg veit ikki, hvat hetta endar við, sigur elinnleggjari við Sosialin.

Meiri á síðu 6.

# Fult hús til hugnaliga framførslu

**Leygarkvøldið tók eitt fullsett Mentanarhús í Fuglafirði hjartaliga ímóti framførsluni hjá Jens Lisbergi – og ikki minst hjá dóttur hansara, Kristel**

KONSERT
*Snorri Brend*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Jens Lisberg, dótturin Kristel og nakrir av frægu tónleikarum okkara hugtóku áhoyrararnar í Fuglafirði leygarkvøldið*

**Fuglafjørður:** Tað var ein hugnaligur dámur yvir konsertini frá fyrsta lagi og til tað seinasta.

Íalt framførdu tey bæði Lisberg omanfyri 25 løg, og tað var ikki frítt, at áhoyrararnir vóru bergtiknir av heitu og hugnaligu røddini á pápanum.

Hann er gamal og royndur í bransjuni, og tað hoyrdist týðiliga at hetta við sanginum, tað meistrar hann til fulnar.

Vit hoyrdu teir góðu og gomlu slagararnar á føroyskum og enskum, enntá ein á svenskum. Hetta var alt við til at gera hesa løtuna so sera hugnaligt.

At tað so mitt í konsertini var høvið at fáa ein heitan kaffimunn við góðum heimabakaðum køkum, gjørdi eisini sítt til, at stemningurin var í hæddini alla konsertina, sum vardi í góðan hálvan triðja tíma.

## Besta røddin

Eitt serligt point og ein serstøk uppliving á konsertini var tann bert 17 ára gamla dóttir hansara, Kristel.

Tá hon av álvara slapp at royna seg við hennara sangum, lyfti hetta líkasum konsertina uppá eitt høgt støði: Er tað nakað sum Kristel dugir sum fá, so er tað at syngja.

Tað var neyvan nakar áhoyrari sum ivaðist í, at her er talan um eitt stórt talent, sum vónandi bara kann fáa høvið at menna seg enn meiri í framtíðini.

Tað vóru tó ikki bert føroyingar her á landi sum hava skilt hetta. Á konsertini var eisini ein føroyingur, sum hevur búð handan hav í eini 20 ár.

Eftir konsertina var hann øgiliga spentur eftir at fáa orðið á Kristel. Og tað eydnaðist honum eisini backstage.

– Hey, Kristel. Tú ert ein fantastiskur sangari, og tú hevur eina framúr góða rødd.

– Eg skal siga tær sannleikan: Tað eru bara tvey fólk í Føroyum sum veruliga hava sangararøddir. Og ta einu røddina, hana eigur tú!, segði hann sera sannførdur á málinum.

Einki varð kortini sagt um, hvør átti hina røddina.

Millum aðrar áhoyrarar hetta kvøldið vóru eisini løgmaður, Jóannes Ejdesgaard og mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni.

Lítil ivi er um, at teir eisini hugnaðu sær hetta kvøldið!